




# Vert at lurta eftir

**Ummæli av konsert hjá Føroya symfoniorkestri (strúkiorkestri) í Fríðrikskirkjuni leygardagin 28. mai 2005**

UMMÆLI
*Frits Johannesen*

Ein sera snotilig konsert fór av barkastokki í Fríðrikskirkjuni á Toftum henda dag. Tað, sum eisini vert var at nema við, vóru tey ungu, sum góvu ljóð saman við eldri og tilkomnum fólki í orkestrinum. Hetta er ein mennandi máti, at geva teimum ungu møguleikan at sita á einum bekki í symfoniorkestrinum og vera við í symfoniskum tónleiki. Hetta fara tey aldri at gloyma, tá ið tey fyrstu ferð komu inn um hesar dyr og sótu saman við t. d. Jens Chr. Guttesen, Símun Nónklett, Jónsvein Mikkelsen, Alex Sólstein og Jóannes Andreasen. Hetta er grindin kanska, ið tú skalt ígjøgnum fyri at mennast sum ein góður tónleikari og halda á fram í tí klassiska umhvørvinum.

Skráin var ljós, løtt og ljómandi. Hon nam við Purcell, Vivaldi, Bach, Albinoni, Mozart og Grieg. Væl valt í tí ljósa mai, hóast ein kaldur gjalur fór út eftir Skálafirðinum og nartlaði sóljukopparnar, ið ikki tordu at stingu kríllin undan mýrulendinum. Bernharður Wilkonson fekk ikki bert kríllin undan í tónleikagongdini henda seinnapart á Toftum, men fekk eisini tey ungu sprundini og teir ungu kallarnar í strúkandi strokum at spretta í gyltum mýrusóljum. Soleiðis er tónleikur. Hann fekk tey, sum lurtaðu at sveima, sveima í summardreymum í tónleikamynstrum úr kønu hond Bernharðs.

### Purcell

Henry Purcell ( 1659-95) hevur mær altíð dámt vælduettir hansara, sálmatónleikin, kamartónleikin og opratónleikin. Hann hevði eisini týdning fyri Händil. Her var so ein dansur Chaconne - Chacony spældur (3/4 takt). Ein dansur, sum kom úr Miðamerika til Spania uml. 1600 og bleiv brúktur í orkestursuitum..

Purcell var eitt innarligt baroktónaskald, tí var væl valt at spæla hetta tónaskald ein summardag í mai. Kanska var orkestrið eitt sindur trilvandi í intonatiónini í byrjanini, men eg haldi, at sum frá leið bleiv dyrgingarlagið betri og betri og kom ljómurin at standa rámligur undir kønu hond Bernharðs. Jóannes Andreasen stuðlaði væl á cembalo, sum eisini var stuðulin í fyrstuni í barokorkestrunum. Summum førum vóru tvey "klaver" brúkt fyri at fáa akordirnar so væl fyri dagin sum gjørligt. Lat meg siga eitt afturat, at Purcell bleiv bara 37 ára gamal, var móðurloysingur og uppvaksin hjá pápabeiggjanum, sum stuðlaði honum í hansara tónlistaligu gongd.. Vit vita ikki nógv um Henry Purcell, men hann livdi eitt eydnusælt lív, hóast hann doyði sum ungur.

### Vivaldi

Ikki hoyra vit oftani í Føroyum sologittar og symfoniorketsur, men her var væl valt at lata løtuna í eitt tónleikastykki av Vivaldi 1675-1741, sum millum annað eisini gav Bach íblástur til sína tónlist. Vivaldi skrivaði 40 oprur og 600 instrumental tónlistaverk og kendasta av teimum eru tey 12 stykkini fyri kamarorkestur og leggjast kann afturat at namframasta av hesum eru tær 4 árstíðirnar.

Gittarkonsert í D-Dur, R.V. 93 av Vivaldi(1675-1741) solistur var Ólavur Jakobsen. Eg veit ikki um eg tori at siga, at hetta var fyrstu ferð at hetta stykki ljómaði í Føroyum, men sama gerð. Einkult í sínum vavi og bygnaði, av og á eitt sindur útryðjuhvítt í ljóminum, ikki trilvandi, skvatlutt og uppgjørt, men livandi, ljóst og dropakent. Hetta kom væl fram í gittarspælinum hjá Ólavi . Hansara ljóðfyltu dropaljóð slerdu afturíaftur í gittarinum og orkestrinum eins og dropar, ið detta niður á hellutún og steinamosa. Ja, ja, og Jóannes bygdi væl upp undir løtuna við sínum spæli á cembalo og Sámal sat ikki í rongini við violinini millum knøini, men stýrdi sínum ljóðføri viðkvamt í dropavatni. Har sum vatn er, er eisini lív.

Millum kendastu stykkini hjá Vivaldi eru 12 stykkir fyri kamarorkestur, har tey fýra fyrstu partarnir eru Árstíðirnar. Jú Ólavur skal hava rós fyri solo sína- forkunnungt og summarsligt.

### Bach

Tá ið tosað verður um barokktónleik eru tað Bach og Händil, sum eru drívmegin í hesum tíðarskeiði. Bach (1685 - 1750) ljómaði her í Brandenburger konsertin nr. 3, BWV 1048. Bach tónsetti hetta megnarverk í Köthen - Anhalt, har hann var hofkapel-meistari. Hovið í Köthen var reformert, og var einki ljóðføri í kirkjuni, so guðstænasturnar fóru fram uttan orgul. Hetta helt Bach vera sera løgið, men haraftur ímóti setti hovið stór krøv til tónlistaevni hansara , har hann skrivaði tónleik, sum varð framførdur um kvøldarnar við hetta reformerta hovið. Her gjørdi hann Brandenburg konsertirnar - seks í tali. Heitið fingu hesar konsertir eftir markgreivanum Christian Ludwig av Brandenburg, sum Bach hevði møtt í Karlsbad. Ljómurin í hesum konsertum letur teg í barokkhýr og her er skapið "concerto grosso", har alt orkestrið skiftivís spælir saman við einum minni orksetri - " concertino" ein lítil bólkur av solistum. Rúmsátt er undir bitunum í Fríðrikskirkjuni, so ljómurin av hesum rúmliga Brandenburgersatsinum trein fram í tí ljósa mai, í tí kalda gjalinum og hitaði tína sál. Ófført!

### Albinoni

Eftir henda ljóm hoyrdu vit Tomasso Albinoni, sum livdi frá 1671 til 1750. Spælt varð Adagio fyri strúkarar og orgul. Hann var bæði komponistur og violinistur, og hevur t. d. skrivað 50 oprur og hevur eisini ment violinkosertina. Tað, sum varð hugtakandi í hesari framførsluni, var oyndfirðingurin Julian Rasmussen. Ungur tónleikari, ið spenti frá á tí frálika orglinum í hesi kirkju. Stykkið var følið og ikki so lítið av romantykki var í hesum tónastykkinum. Julian oysti av sínum listagávum. Eg hugsaði um abba hansara, Adolf Rasmussen undir Garði í Oyndarfirði, sum í sínum døgum tráddi urguna í Oyndarfjarðar kirkju, somuleiðis pápa hansara, Sigmund Rasmussen, sum er organistur í somu kirkju, so hesin ungi maður hevur urguna í kjøtinum borið. Hetta tónleikastykkið fylti væl skránna og nam hetta hjartastreingirnar hjá einum skyldmanni, sum er farin um tey seksti.

### Mozart

Eg geri ikki so nógv burtur ú Eine kleine Nachtmusik, k.v. 525 av Mozart ( 1756-1790), men bara siga tað, at hetta er nakað av tí fyrsta, sum fangar oyrað, tá ið tú fert at lurta eftir klassiskum tónleiki. Børn elska henda ljóslivandi tónleikin. Lættur og dandandi í instrumental føringini. Tað er nakað gudakent í tónlistaskaldskapinum hjá Mozarti, sum veitir sinninum lyndrandi sálarkenslu, og tað gjørdu hesi ungu, sum sótu í Fríðrikskirkjuni og spældu við Mozart á knøunum.

### Grieg

Konsertin endaði við Holberg suituni av Edv. Grieg (1843-1907). Grieg livir í eini tíð, har rembingar í tónlistini og myndlistini flyta seg sum ongatíð áður. Hetta er eitt áhugavert tíðarskeið - kanska tað tíarskeiðið, sum flytir hugtakið um list í básar, sum fólk enn tann dag í dag hava ilt við at skilja. Eftir 1900 er listaliga skrædlið, og hevur tað ikki steðga á síðani - 12 tónaskalin og kubisman ganga næstan hond í hond uml. 1908 beint eftir deyða Edvards. Edvard Munch málar tað innara menniskja (1863-1944) og Sigmund Freud (1856-1939) skrivar um tað innara mennikja.

Edv. Grieg skrivar Holbergsuituna í 1886. Hann letur ikki nógv úr hondum frá 1883 til 1886, men tá bragdar aftur, tá ger hann Holberg suituna, sum stendur, sum ein varði í norskari tónlist. Íblásturin var 200 ára føðingadagurin hjá Holberg. Grieg var hugtikin av Holberg, tí dámdi honum at hann tónlistaliga kundi lata Holberg í nútíðardám við íblástri fra 1700 talinum og hugsaði hann tá um Couporin, Rameau og Bach. Andin í stykkinum er franskur, reindyrkað klassisma, tónamálið er romatikkur og ljómurin er norskur, sum Grieg so væl dugdi at fáa fram.

Suitan er fyrst skrivað fyri klaver, men seinni í 1885 varð hon skrivað fyri strúkiorkestur og fór hon í hesum líki um tann víða heim.... og 28. mai í ár kom hon á gátt í Fríðríkskirkjuni á Toftum.

Eg vil bara siga afturat, at hetta komu tit sera væl frá, sum hetta kvøldið løgdu árar í sjógv, struku av stað og endaðu í norðurlendskum strokum. Grieg var ein meistari at skriva fyri strúkiorkestur. Tann ljósi norðurlendski ljómurin flirraði í hesum stykki, sum tit so sera væl dugdu at fáa fram. Airsatsurin er nakað av tí vakrasta, sum hann hevur skrivað, og vil eg siga til seinast, at orkesturleiðarin Bernharður Wilkonson stóð seg stak væl í hesi roynd at konfirmera hesi ungu í løttum klassiskum tónleiki og at fáa serstakliga gott vibrato fram í hesum strúkiorkestri og serliga í Holberg suituni.

Hetta var ein frálík konsert, sum verd var at lurta eftir.